# Dómsnevndarálit

**Hugskotskapping um miðøkið í Klaksvík**



## Fororð

Tað hevur verið ómetaliga spennandi og eitt stórt upplivilsi at verið í arbeiðnum, sum dómsnevndin hevur gjørt í hesari kapping.

Í dómsnevndini hava sitið 6 umboð fyri Klaksvíkar Kommunu og býin yvirhøvur umframt 3 fakdómarar – hesi eru: Gunvá við Keldu, borgarstjóri, Auðunn Konráðsson, formaður í Byggi- og Býarskipanarnevndini, Óluva Klettskarð, býráðslimur, Heri M. Hammer, býarverkfrøðingur, Magnus Arge, umboðandi Klaksvíkar Handilsfelag, Edward Fuglø, listamaður, Gunnar Hoydal, arkitektur, Mikael Viderø, arkitektur, og Vibeke Lindblad, arkitektur. Skrivari og umsiting hjá dómsnevndini vóru Tórálvur Weihe, arkitektur vegna Arkitektafelag Føroya, Robert Thomassen og Selmar Nielsen, arkitektar frá SNA.

Tað hevur verið mær ein heiður at arbeitt saman við hesum fólkum, harímillum nøkur teljast millum okkara fremstu arkitektar, sum hava drúgvar royndir innan býarplanlegging, og vil eg her nýta høvið at takka tykkum øllum, sum mannaðu dómsnevndina og har gjørdu eitt dygdargott og samvitskufult arbeiði – stóra takk fyri. Táið hendan kappingin varð løgd til rættis, vistu vit sjálvandi ikki, hvussu nógv uppskot fóru at koma inn, og hvussu góðskan á uppskotunum fóru at verða. Men í dag kunnu vit við gleði siga, at bæði kvantitetur og kvalitetur – bæði talið av uppskotum og góðskan av teimum – vóru og eru yvir tað, sum tey flestu mundu tora at vóna og vænta.

Ikki færri enn 154 uppskot komu inn, sum heilt erliga er langt oman fyri tað, sum eg sjálv hevði ímyndað mær og roknaði við, so eg má siga, at eg eri sera fegin og takksom fyri luttøkuna. Eisini góðskan av uppskotunum livir fult og heilt upp til væntanirnar, sum eisini verður váttað av fakfólkunum í nevndini, sum greitt staðfesta, at her er talan um ein hóp av uppskotum, sum eru á høgum støði. Eg vil her, vegna Klaksvíkar Býráð, bera eina hjartans tøkk til øll tykkum mongu, dugnaligu fólk, sum hava ómakað tykkum at gera og lata inn uppskot til skipan av

miðbýi Klaksvíkar. Tað hevur verið ótrúliga inspirerandi og hugtakandi at gjøgnumganga øll hesi uppskot. Stóra takk fyri.

Eg vil her nýta høvið til heilt stutt at nevna, at tá ið henda hugskotskapping varð fráboðað, so vóru røddir frammi – og eisini meðan kappingin er farin fram – sum hava sagt, at vit blíva við at tekna og tekna miðbýin í Klaksvík, men einki verður bygt. Hetta er ikki rætt, sum sagt verður. Jú, fleiri miðbýarætlanir hava ligið í kortunum, men tað er so sanniliga eisini bygt og planlagt í tráð við hesar hesi seinastu áratíggjuni, og tað verður tað eisini í løtuni. Samstundis vóna vit sjálvandi, at byggivirksemið í miðbýarøkinum komandi árini og komandi áratíggjur fer at økjast, soleiðis at vit við tíðini fara at fáa ein livandi miðbý, ið verður skipaður á best møguliga hátt, til frama fyri trivnaðin og menningina av kommununi. Júst hetta er endamálið við hesar hugskotskapping.

Eisini sjálvt arbeiðið og samstarvið í dómsnevndini og við tey, ið virkaðu sum samskiparar, skrivarar og umsiting hjá nevndini, virkaði sera væl. Hetta verður undirstrikað av, at tá ið niðurstøðurnar skuldu gerast og vinnarar kjósast, so var tað ein samd dómsnevnd, ið stóð aftanfyri og tók undir við endaliga úrslitinum. Hetta var ikki so, av tí at dómsnevndin ikki diskuteraði og argumenteraði aftur og fram – nei, tvørturímóti var kjakið og viðgerðin í nevndini til tíðir bæði opin og lívlig, har fólk veruliga søgdu sínar ymisku hugsanir og settur orð á teirra sjónarmið. Eg kann tí eisini í dag fegnast um avrikið hjá dómsnevndini – at tað fór fram á ein sera góðan og gevandi hátt.

Í dag, 1. juni 2012, verða úrslitini avdúkað í tiltaki í býráðshøllini í Klaksvík, har 30 av uppskotunum verða sýnd fram fyri almenninginum. Hesi 30 uppskotini vóru tey, ið komu víðari í dømingartilgongdini. Í víðari arbeiðnum hjá dómsnevndini varð talið av uppskotum síðani skerd niður á 15, og av hesum kom dómsnevndin í sínum áliti at enda til ta niðurstøðu, at 9 uppskot vórðu kosin at verða tey vinnandi, innkeyptu og heiðraðu uppskotini, sum eg vegna Klaksvíkar Býráð ynski hjartaliga tillukku.

Afturlítandi yvir øll tey 154 uppskotini, sær man, at tað eru nógvir hættir at loysa uppgávuna, at skipa Klaksvíkar miðbý, men vinnarauppskotini skaraðu framúr. Hesi úrslit verða nú grundarlagið fyri víðari tilgongdini fyri skipanini av miðbýnum, og fer kommunan nú at hyggja meira gjølliga, serliga at vinnarauppskotinum, men eisini at hinum vinnandi uppskotunum og innkeyptum uppskotum, fyri at gera eina byggisamtykt fyri økið.

Klaksvík, 1. juni 2012

Gunvá við Keldu
Borgarstjóri

**Klaksvík í framtíðini**

Í kappingarskránni biður Klaksvíkar kommuna um uppskot, sum fara:

- at skipa Klaksvík til ein meira samlaðan bý tvørtur um Eiðið, sum bindur saman báðar síður í býnum
- at skipa ein nýggjan miðbý við almennum funktiónum, sum vilja økja um títtleikan av fólki, sum hava ørindi í miðbýnum
- at geva framtíðar miðbýnum loysnir, ið eru burðardyggar í mun til Agenda 21 prinsippir
- at vísa á ein meira tættan miðbý við s*hared space* prinsippum fyri ferðslu
- at vísa á loysnir, ið taka hædd fyri veðri og vindi, har serliga vindurin tvørtur um Eiðið má avmarkast fyri at fáa lívd meginpartin av árinum, fyri uppihaldi úti fyri gangandi og súkklandi
- at gera Klaksvík til ein attraktivan bý, ið kann kveikja nýggjar vinnur, nýggja mentan og nýhugsan
- at geva Klaksvík bygningar í miðbýnum, sum saman skapa útiøki, har arkitektonisk dygd og umhvørvi verða raðfest høgt
- at styrkja og betra um miðøkið sum møtistaðið, ið varpar ljós á samleika, sum fer at tryggja eina menning av staðnum og fólkagrundarlagnum
- at geva eina heildarætlan, ið skipar miðøkið og koblar nýtt við verandi bygging í miðøkinum
- at geva eitt tilmæli til eina miðbýarætlan, sum verður implementerað í eini lokalari byggisamtykt fyri økið.

**Almennar viðmerkingar hjá dómsnevndini:**
Tað hevur verið ein gleði hjá dómsnevndini at kunnað staðfest tann ógvuliga stóra áhugan, sum tey 154 innkomnu uppskotini úr øllum heiminum umboða. Hesi uppskot spenna frá tí listarliga til tað utopiska, og ímillum hesi mørkini eru meginparturin av uppskotunum stødd við veruleikakendum, víðskygdum og áhugaverdum uppskotum um býarmenning í Klaksvíkar kommunu.

Dómsnevndin hevur sambært kappingarskránni havt hesar reglur at ganga eftir:

**Krøv til innlatið tilfar**

Innsent tilfar skal innihalda í minsta lagi, men er ikki avmarkað til:

- Flatmynd og skurðar í lutfallinum 1:500 fyri miðøkið (kappingarøkið)
- Illustratiónir, ið vísa hugskot í mun til umhvørvið og kunnu bera fram eina rúmgevandi mynd í mun til umhvørvið
- Flatmynd í lutfallinum 1:2000 fyri økir í nærumhvørvinum (økið 2) og Klaksvík annars, ið vísa heildarætlan saman við verandi býi.
- Illustratiónir og greiningargrundarlag, ið stuðlar flatmyndina omanfyri við vegleiðingum um snið og skapanartilgongd av høvuðshugskotum
- Teksttilfar, ið stuðlar tekningum, illustratiónum v.m.

Tað, ið vísast skal, er:

- Hugskotið í mun til ella saman við verandi býi
- Pláss/møtistøð av týdningi verða útgreinað við innbúgvi við áherðslu á nýtslu dag og kvøld
- Bygningar, gøtur, gongu-/súkkluvegir, parkering
- Vøkstur og viðgerð av lendi
- Skap- og góðskulýsing av týðandi loysnum
- Etapuuppdeiling og stødd á ymisku etapunum

**Dømingarfyritreytir**

Uppskotini verða dømd eftir góðskuni á heildarloysnunum fyri alt kappingarøkið, hetta í mun til loysnir innan býarplanlegging, arkitektur, landslagsviðgerð, og býarrúm og –design
Harumframt er ynskiligt, at uppskot á kreativan hátt vísa á møguleikar at sameina verandi bygging og umhvørvi á kappingarøkinum við nýggja miðbýin.

**Dømingartilgongdin**

Í allari metingini av uppskotunum hava evni sum m.a. sjóvarmálin, skipan av byggingini, støddarviðurskifti, býarrúm, herundir tøtt bygging, givið høvi til nógvar og áhugaverdar samrøður, allar við tí endamáli at finna fram til eina framtíðar menning av Klaksvík á høgum stigi. Metingin hevur tikið støði í 5 evnum, sum eru í samsvari við tær hugsjónir fyri Klaksvík í framtíðini, sum settar eru í kappingarskránni. Hesi 5 evnini eru samstundis ein liðiligur og sterkur karmur um komandi menningina av býnum.

**1. Sjóvarmálin**

Í komandi býarbyggingini, ið hevur tað stóran týdning, hvussu sjógvur og land møtast, og hvussu sjóvarmálin verður viðgjørdur á kappingarøkinum. Býurin er einstandandi, bygdur millum fjøll og fjøru, og hvar tú enn ert, sært tú út á sjógv.

Hetta hevur gjørt, at dómsnevndin hevur verið hugtikin av uppskotum, sum miðvíst arbeiða við spurninginum, hvussu vatnið møtir landi, og hvussu strondin verður skipað. Tey bestu uppskotini geva tí uppfylta økinum eitt skap, sum vísir á spennandi møguleikar, tó uttan at uppfyllingin er bindandi og ikki kann broytast.

Nógv uppskot arbeiða eisini við at gera Ósánna til ein virknan part í nýggja miðbýnum, og í flestu uppskotunum ríkar hon heildina við sínum natúrliga og livandi skapi.

**2. Støddir og býarrúm**

Tað er ymiskt í byggiskipanini og bygningsstøddum, hvar á slættanum verður tættast bygt og hvussu stór tey einstøku byggiøkini eru. Flestu uppskotini arbeiða við støði í verandi húsastøddum, og byggingin lagar seg av tí sama væl til økið. Nógv uppskot vilja kortini lata teir almennu felagsbygningarnar gera vart við seg í býarheildini, annaðhvørt við einum størri vavi ella við at geva teimum sermerkt og eyðkent skap. Tey bestu uppskotini sameina hesar eyðkendu bygningar við verandi støddir í Klaksvík, men geva samstundis býnum nakað, sum ikki áður er roynt.

Dómsnevndin hevur í áliti sínum gjørt vart við tey uppskot, sum skapa eina byggilistarliga heild í býarrúmum, sum eru væl vard móti vindi, og sum kunnu gerast veruleiki innan fyri eitt avmarkað tíðaskeið, uttan at krevja sera stórar almennar íleggingar.

**3. Sambond og heild**

Klaksvíkar kommuna ynskir við kappingini at fáa fram uppskot til sambandið tvørtur um Eiðið, so at eystari og vestari parturin av býnum kunnu bindast betur saman. Og tað hevur Klaksvík fingið nógv áhugaverd boð uppá!

Flestu kappingaruppskotini greiða frá og tekna samanbindingar millum báðar armarnar sum ein týðandi part av heildini og sum eina fyritreyt fyri at byggja tætt í miðøkinum. Uppskotini eru ymisk, frá at vera promenadur niðan við vágni báðumegin og meira lítillatnar skákgøtur hjá teimum, sum eru til gongu, og til at vera gøta við íbúðarhúsum bygd tvørtur um vágna og soleiðis binda armarnar í Klaksvík saman í en runding.

Dómsnevndin hevur við innkomnu uppskotunum fingið nógv hugskot, teirra millum fleiri, sum ljós verður varpað á við at keypa tey í kappingini.

**4. Mentanar- og felagshús**

Fleiri uppskot brúka tað uppfylta økið til at gera tey almennu virkishúsini til eitt slag av ”mentanaroyggj”, sum so verður eitt eyðkent býarmerki fyri Klaksvík við fjøllunum uttanum sum pallmyndir. Har ið uppskotini geva mentanarbygningunum ítøkilig skap – mong teirra vøkur og listarliga á høgum støði – verða aðrir partar í heildini mangan ikki lýstir nóg væl og tykjast tí minni sannførandi í síni heild.

Tey bestu uppskotini skapa við at seta hesa bygningarnar rætt saman eitt samvirki við hinar partarnar av heildini og gevur býnum ein nýggjan samleika, niðri við vágna við øðrvísi býar- og havnarúmum, ið á sannførandi hátt kunnu geva menningini av Klaksvík eina nýggja byrjan.

**5. At fremja í verki**

Tað er á mangan hátt ein stór avbjóðing at skula standa fyri menningini av Klaksvík tey komandi 10 – 30 árini. Ein avbjóðing er at virka saman við býnum í dag og flætta tað nýggja á rættan hátt saman við tað verandi. Onnur avbjóðing er at skapa eina

skilliga høvuðsskipan, sum hevur í sær orku til at sjálv at mennast og møguleikar fyri at laga seg til broytingar, sum ikki ber til at siga nakað um í dag.

Tað er avgerandi fyri Klaksvíkar kommunu at fáa eina sterka menningarætlan, har høvuðskipanin kann standa føst, sjálvt um ynski um byggiøki og byggislag broytast, og sum tað ber til hjá dagligu umsitingini at standa fyri.

Heilt fá uppskot hava gjørt hesa avbjóðing til eitt høvuðsmál, sum sæst aftur í skipanini av økinum. Heilt nógv hava hinvegin víst myndir av framtíðar býnum, sum kundi alt verið gjørt beinanvegin í einum høggi. Men mong uppskot umtala kortini spurningin um stigvísa útbygging. Tey bestu uppskotini skilja tann týdning tað hevur at síggja komandi og verandi umstøður og bygningar sum  samskipandi partar í heildini – ikki bara sum arkitektoniskar byggingar -  men sum ein møguleiki at draga at sær nýtt virksemi, ið kann gera hugsjónina um ”ein livandi bý” til veruleika.



*Kvøldmynd, vinnandi uppskot nr.62/13542 Biskupstorg*

**Viðmerkingar hjá dómsnevndini til uppskotini, ið hava fingið virðisløn, eru keypt ella hava fingið heiðrandi umtalu**

**Vinnandi uppskot**

**Uppskot 62, mrk. 13542. Klaksvík City Center. Biskupstorg.**
**Uppskotsstillari: Henning Larsen Architects, Ósbjørn Jacobsen, ark., Maine Godderigde, stud.ark., Anna Sundstedt, stud.ark., Wesam Asali, visualisering, Kalle Park, Veðursimulering (Danmark)**

1. heiðursløn, kr. 400.000

Megintankin í uppskotinum er at skapa eitt eyðkent og væl vart býarrúm í miðjuni á tí útlagda økinum, ein miðdepil og eitt borgaratorg, sum samstundis verður týdningarmesta savningarstaðið í býnum við handlum, kaffistovum, miðstøð fyri ferðafólk og vitjandi í einum ringi, uttan um torgið og við skrivstovum, vinnuvirkjum og íbúðum í teimum ovaru hæddunum á húsunum. Hetta býartorgið hevur eitt skap, sum fer at verja fyri veðri og vindi og gera, at har verður dámligt at vera, eisini gerandisdagar, tá ið virksemið er avmarkað.

Út frá hesari kjarnuni ber so til at byggja út í stigum so hvørt, bygningar sum mentanarhúsið, sjóvinnusavnið, umsitingarhús til kommununa við tænastum til borgararnar. Týdningarmikið er tað, at miðbýurin longu kann vera ein veruleiki sum handilsmiðstøð innan fyri eitt stutt áramál og uttan at krevja stórar almennar íløgur í fyrsta umfari.



Støðuplanurin er einfaldur og sannførandi við teimum báðum áunum, Ósá og Vágsá, sum lata seg upp móti vágni, Vágsá sum ein býarkend kanal, ið førir inn til ein bátahyl í suðursíðuni á býartorginum, Ósá sum ein frítt rennandi á, ið endar í víkini á sólsíðini við Biskupsstøð við sandstrond og neystum, soleiðis sum fyrr var í Klaksvík.

Hetta gevur tilsamans eitt skap, ið vendir sær natúrliga móti vágni og útsýninum, og her úti, í vøkrum sambandi við býartorgið, standa teir týdningarmestu bygningarnir: Mentanarhúsið og sjóvinnusavnið.

Teir báðir armarnir í býnum verða styrktir við gongubrúgv fram við innasta partinum av vágni, og innaru megin gongubrúnna verður skotið upp at hava tættari bygging við handlum, skrivstovum og íbúðum nakað sum uttan um býartorgið. Á vestara arminum inn ímóti miðøkinum er skotið upp at byggja eitt nýtt hotel. Ferðsluskipanin er einføld við einum vegi inn til busstøðina tætt upp at torginum og annars at hava løgd tún felags fyri koyrandi, gangandi og súkklandi ferðslu. Harumframt verður skotið upp at gongubrúgvarnar verða bundnar saman og halda fram tvørtur um Eiðið til Borðoyavík og økið Úti í Grøv.




Teir enstøku partarnir í uppskotinum kunnu verða nærri viðgjørdir í endaligu ætlanini, men tað er týdningarmikið ikki at sleppa høvuðsskapinum við sínum greiðu útsýnislinju, eitt skap, sum á stórfingnan hátt er vístur í stjørnuskapaðu tekningini av samanbindingini millum verandi býin og tann nýggja, sum er komandi hjartað í býnum.

Dómsnevndin heldur, at hetta uppskotið er eitt greitt og byggilistarliga vakurt svar til settu uppgávuna, og at tað fer at geva býnum eitt spennandi og hugvekjandi grundarlag fyri framhaldandi arbeiðinum at gera nýggja miðbýin í Klaksvík til veruleika.

**Uppskot nr. 99, mrk, 29284. Re-connect, Re-invent and Re-Invest Klaksvík. Uppskotsstillari. GROUP 8, Francois De Marignac, (Sveis)**

2. virðisløn, kr. 150.000

Uppskotið er heilt einfalt skipað í tveimum: Eitt bryggjuøki við mentanarhúsi sum komandi eyðkennið í Klaksvík og – innan fyri ein beinan sambindingarveg millum tey bæði innastu punktini í vágni – eitt tætt mynstur av húsum í tveimum og trimum hæddum til bústaðir, handlar og skrivstovur.




Hetta tætta mynstrið roynir ”at styrkja tað, sum longu finst”, sum uppskotssetarin sigur tað. Á kortum og á loftmyndum av Klakvík sæst, at húsini eru sett í longum røðum báðumegin vágna, næstan øll í somu ætt úr landsynningi í ein útnyrðing eftir brattlendinum, sum er. Hetta sterka eyðkennið  verður í hesum uppskotið savnað saman og styrkt í eini strangari, næstan stempulkendari byggiætlan, har tey komandi byggiøkini verða bygd heilt út í øll mark.

Hetta netið verður brotið sundur við trimum minni torgum til ávikavist ráðhús, bókasavn og bátahøll, bundin saman við vegum á skák, sum gera, at tað strangað skapið verður eitt sindur mildari.

Nýggi miðbýurin verður bygdur á einum stórum, sløttum øki, og ætlanin at savna armarnar í býnum í eini sterkari og savnandi bygging, sum samstundis fangar tað eyðkenda byggimynstrið í Klaksvík og veksur um tað, til at fáa ein tættan og vardan bý, er bæði einfalt og hugtakandi.



Uppskotið byggir á uppfyllingina, sum er gjørd, men markar skiftið til sjóvarmálan við greiðum bryggjukantum og áleggingum á gøtur og tún. Nýggi miðbýurin verður bygdur út við gongubrúgvum, út eftir ørmunum á vágni og fer alt í alt at kunna minna um skipanina í gomlum havnabýum við fjøld av ymiskum lívi innan fyri eitt klárt felags mynstur. Tó tykjast tey einstøku húsini í uppskotinum at vera í meira lagi einstáttað í skapi og tilfari, har ið eitt størri frælsi í breidd og longd á byggiøkjunum og í útsjóndini á húsunum eftir metingini hjá dómsnevndini, høvdu givið ein meira livandi og ríkari heild, í samsvari við føroyskan einstaklingakendan byggisið.

Tað ger uppskotið veikari, at tað hevur sum fyritreyt at taka burtur ein part av verandi byggingini, her serliga móti Klaksvíksvegnum. Tað kann fara at gera tað truplari at fremja útbyggingina og møguliga forða fyri at uppskotið kann gerast veruleiki í síni heild.

Dómsnevndin hevur verið hugtikin av tí ógvuliga greiða tankanum og einføldu skipanini, sum er í uppskotinum, og heldur at tað hevði verið væl møguligt at bygt tey einstøku byggiøkini, so hvørt sum tørvurin á nýbygging trokar á.

**Uppskot nr. 40, mrk. 714213. Viðvíkir, New City Center Klaksvik**
**Uppskotsstillarar: Ragnar Zachariassen, ark. maa, Søren Yde Jensen, ark. maa., (Føroyar/Danmark)**

3. Virðisløn 75.000 kr.

Hetta uppskotið ger serstakliga vart við seg í tí, at tað tekur støði í gomlum føroyskum siði at skipa nýbygging í býlingar út frá einum høvuðsgarði ella einari bygd. Gomlu býlingarnir vóru eyðkendur við einum ella fáum sethúsum, og uttan um tey stóðu so øll tey goymsluhúsini, hjallarnir, hvanngarðarnir og annað, sum neyðugt var til landbúnaðin og fiskiskapin. Hesir býlingar vórðu lagdir eftir uppdyrkingarmøguleikum og veðurlagnum á staðnum.



Uppskotið savnar komandi byggingina í fýra býlingar, ið breiða seg úr botninum á vágni og suðureftir gjøgnum eitt vakurt skapað grønt øki, sum við sínum vøkstri og gøtum, kallað Umvegurin, Skákvegurin og Ítróttarvegurin, kundi blivið ein týdningarmikil partur af nýggja miðbýnum, bæði í samskipanini við byggingina og sum sambinding til stóru náttúruna í Klaksvík. Við at lata bygningarnar skjóta seg bæði í flatu og tvørskurði, skapast óreglulig rúm, sum kunnu bróta vind og tryggja eitt vart veðurlag.

Skotið verður upp, at hvør býlingur fær sítt serstaka eyðkenni og nýtslu, so sum skilst av nøvnunum: Mentanarbýlingur, Havnarbýlingur, Tænastubýlingur og Hendingabýlingur. Tað ymiska virksemið krevur ymiskar støddir, frá smáum eindum við egnum byggiøkjum til størri eindir, sum verða bygdar í einum. Allir býlingarnir kunnu hava handlar, vinnuvirki og, tó ikki mentanarbýlingurin, eisini íbúðir.



Dómsnevndin heldur, at skipanin av fríøkjunum kann vera ein góður íblástur til framhaldandi arbeiðið við miðbýin. Fjórði býlingurin vísir eisini eina bygging á Akursmørk, sum kundi verið við til at styrkt Vágstún sum eitt virðismikið býarrúm í Klaksvík. Skapið á tí uppfylta økinum við tí stóra margmentahúsinum er einastand-andi vakurt sum arkitektoniskt verk við góðum uppihaldsøkjum fram við bryggjuni, hóast tað vísta grøna økið beint her tykist at vera heldur fremmant í heildini.

Samanbindingin av gomlum føroyskum byggisiði við eitt sterkt og spennandi nútíðarskap, er ein áhugaverd roynd og hevur stóra virðing uppiborna, hóast tað ivaleyst hevði verið ógvuliga krevjandi at gjørt til veruleika.

**Keypt uppskot**

**Uppskot nr. 36, mrk. 12557, ”The Klaksvik Lobster”**
**Uppskotsstillarar. Erik Juul, ark. maa., mdd., Tue Trærup Madsen, ark. maa., Madleena Larivaara, ark. maa., Terje Nedergaard, foto (Danmark).**

Keypt fyri kr. 50.000

Uppskotið er eitt av teimum, sum koma í bólkin ”mentanaroyggin”, har tey almennu felagshúsini verða løgd fyri seg og ógvuliga sjónsk á eini næstan fríttskornari oyggj ella hólmi innast í vágni.

Uppskotið arbeiðir við at stimbra bygging fram við bryggjunum og at byggja tættari eftir Klaksvíksvegnum suður til rundkoyringina og víðari fram við Biskupsstøðgøtu eystur til Ósánna.



Uppskotið verður keypt, tí tað vísir eina sannførandi samanbinding við tann verandi býin og skipar eina tilgongd við nýggjum fjølbroyttum býarrúmum.

Ein dygd í uppskotinum er, at tað er ført fyri at laga seg til komandi býar-bygginga í Klaksvík eftir teimum skiftandi ynskjunum og rákunum innan fyri byggiøkini og byggiskapini í framtíðini.

Dómsnevndin heldur skipanina við kanalum vera áhugaverda, men kundi hugsað sær eina gjøllari viðgerð av sjálvari mentanaroynni og av gøtunum, sum skulu binda báðar armarnar saman.

**Uppskot nr 25, mrk 95522, ”Klaksvík Kanalcentrum”**
**Uppskotsstillari: Peter Sand, ark. maa., (www.peter-sand.dk, Danmark)**

Keypt fyri kr. 50.000

Uppskotið ”Klaksvík Kanalcentrum” arbeiðir, sum navnið bendir á, við vatni og kanalum í nýggja miðbýnum. Ætlanin hjá uppskotssetaranum er at ganga frá spjaðingini av húsum og fáa betri samband millum báðar armarnar við at byggja tætt á tí uppfylta økinum og styrkja byggingina fram við nýggjum bryggjum við góðum sambandi eystur og vestur til báðar síður.

Skapið á økinum inni í botninum er vakurt, og tað tykist, sum hevur hetta altíð verið ein natúrligur endi á vágni í Klaksvík, tó ikki uttasti molin, ið kenst ov ógvusligur og fremmandur í allari heildini.



Dómsnevndin heldur breidd og skap á kanalunum vera veruleikakend og hóska til ta stórfingnu náttúruna í Klaksvík, so at tankarnir ikki leita til tær fínligu kanalbýirnar í Evropa, men fara at vera eyðkendar fyri Klaksvík og skapa nýggj virði í býnum.

Tætta byggingin fram við bryggjunum er mest til íbúðir, og í hesum sambandi hevur dómsnevndin serstakliga mett byggingina framman fyri Føroya Bjór vera eitt gott og veruleikakent uppskot, meðan mentanarhúsini eru løgd innanfyri og av tí sama uttan beinleiðis samband við sjógvin, sum er tað tilfeingið, sum eyðkennir Klaksvík fram um alt annað. Hetta tykist at vera eitt mistak í heildarætlanini.

Í metingini hevur dómsnevndin verið hugtikin av teimum mongu og vælhóskandi byggiøkjunum, sum kunnu gera tey løtt at broyta og selja til bygging so hvørt.

**Uppskot nr. 90, mrk. 10707, ”Miðøkið í Klaksvík”**
**Uppskotsstillari: Páll Holm Lave, ark. maa, af (Tórshavn, Føroyar)**

Keypt fyri kr. 25.000

Uppskotið arbeiðir í høvuðsheitinum við at skapa samband millum eystara og vestara arm á býnum tvørtur um vágna. Eitt bygt samband, sum á einfaldan hátt loysir ein trupulleika, sum Klaksvík hevur í dag. Uppskotið ætlar at gera nakað við tey longu strekkini í býnum og ta vantandi miðsavningina við at gera eina brúgv við húsum tvørturum longri úti á vágni. Við at binda seg at teimum verandi sambondunum hevur uppskotssetarin skapað ein fullan ring, sum verður tann nýggi miðdepilin. Við byggingini á kappingarøkinum og hesari bygdu brúnni longri úti skapast eitt vardur bátahylur, sum verður ein sameindur partur av byggiætlanini.

Uppskotið verður keypt fyri hetta áhugaverda uppskotið um húsabrúnna tvørtur um vágna, sum ivaleyst hevði kunnað verið gjørd, í minsta lagi eina ferð, og kanska – um kommunan í eini seinni útbygging hevði sæð hetta sum ein máta at skapa nýtt byggiøki og samband millum armarnar – endurtikið uppaftur longri úti seinni í tíðini.



Uppskotið ger, at teir almennu mentanarstovnarnir verða ikki lagdir í fyrstu røð móti vágni, men ímóti hesum nýggja vatnrúminum og fáa sostatt ikki ta annars sjálvsøgdu staðsetingina í heildini. Hetta tykist at vera ivingarsamt at gera í Klaksvík, har býur og borgarar eftir gomlum siði í hesum størsta fiskivinnubýi í Føroyum altíð hava latið bústaðabygging vikið fyri virksemi fram við havnalagnum.

**Uppskot nr. 42, mrk 74327. “Tales of Klaksvík”**
**Uppskotsstillari: CORNELIUS + VÖGE, Dan Cornelius, arch. maa, Birta Frodadottir, arch. maa, Søren H. Nielsen, stud.arch., Erling Ch. Forfang, stud.arch. (Danmark)**
Keypt fyri 25.000

Uppskotið arbeiðir við kanalum og vatnrúmum sum høvuðevni í nýggja miðbýnum. Samstundis sum skapað verða nógv ymisk býarrúm við ella uttan um sjóvarmálan, er hetta eitt uppskot, sum gevur eitt sannførandi boð upp á eina uppgerð við tann spjadda býin og vantandi sambandið millum báðar armarnar í býnum. Tað verður skotið upp, at í nýggja miðbýnum verður bygt á eini røð av smáum kanaloyggjum ella hólmum, samstundis sum verandi uppfyllingin verður partur av hesum sama við tí skilliga muni, at her verða teir stóru mentanarbygningarnir settir á einari størri, tillagaðari kanaloyggj.

Uppskotið verður keypt fyri sítt góða hugskot við bygdum hólmum fram við havnalagnum og sambandinum tvørtur um vágna, sum væl kundi verið framt, um so er, at kommunan heldur hetta vera ein háttur at binda báðar armarnar saman í eini seinni ørðvísi útbygging av økinum.

Dómsnevndin heldur, at breidd og skap á kanalunum eru realistisk, og soleiðis fara kanalirnar at skapa nýggj virði í Klaksvík.



Í metingini hevur dómsnevndin fegnast um tey nógvu byggiøkini samanbundin av vatnrúmum við teimum dygdum, sum hetta gevur, har tað verður møguligt at laga byggigrundir til og selja tær frá so við og við.

**Uppskot nr. 13, mrk. 51230. "Sewing Community"**
**Uppskotsstillari: DL+A-SIZE*, Rene Daniels Ayala, Miguel Angel Lozano, Helena Bayona Galve, Juan S. Romero, Miguel A. Casadiego, Raola Gomez, Gabriel Ortiz, Mauricio Garzon (Bogotá, Colombia)**

Keypt fyri kr. 25.000

Uppskotið er í tí bólkinum, sum leggur serligan dent á byggingina út móti havnarlagnum, ikki bara í botninum men eisini fram við báðum ørmunum. Uppskotið ger nógv burturúr at gera ætlaðu mentanarhúsini til eyðkendar bygningar á økinum, sum við kanalum verður skorið burturúr sum eitt nes innast í vágni.

Uppskotið er í tveimum. Annað er at skapa nýtt virksemi við einari greiðari og virðiligari havnarpromenaðu, har nógv ymiskt hendir í skiftinum millum bý og sjógv og í skiftinum millum býin og byggingina fram við bryggjunum móti vágni.

Uppskotið verður keypt fyri sína sterku viðgerð og harvið pallseting av einari samanbindandi og skiftandi promenadu, sum eigur at gerast ein partur av framtíðar skipanini fyri økið.

Sterka hugskotið um eitt væl skipað samband allan vegin fram við havnarlagnum, sum umframt at binda saman báðar armarnar kann gerast ein spennandi røð av skiftandi býarrúmum við handlum og íbúðum og viðgerð av sambandinum millum bý og sjógv, tykist verða sjálvsagt í Klaksvík.



Dómsnevndin fegnast um viðgerðini fram við fjøruni men ivast í teimum opnu fløtunum, sum verða lagdar uttan um mentanarbyggingina. Hetta tykist ikki at samsvara við ynskið um ein tætt bygdan og væl vardan miðbý.

**Uppskot nr. 44, mrk. 62718. In the Mist of Klaksvík**
**Uppskotsstillarar:**
**Sanne Lovén Damgaard, ark. MAA, Signe Høyer Frederiksen, ark. (Danmark)**

Heiðrandi umrøða

Hetta uppskotið hevur dómsnevndin hildið at hava uppiborið at fáa heiðrandi umrøðu. Tað er eitt ógvuliga vakurt, næstan skaldborið verk. Ein sannførandi greining av náttúru og samteksti førir fram til eitt uppskot á høgum listarligum støði, og dómsnevndin heldur, at í tí eru tankar, sum kunnu ella eiga at verða tiknir við í framhaldandi viðgerðini av teimum vinnandi uppskotunum. Søgan um íblásturin frá náttúruni til at skapa grønar oyggjar, sum so hvørt verða bygdar, tey sjálvsøgdu rúmini millum oyggjarnar, undirstøðukervið og tey góðu býarrúmini og umskipan av landslagnum til mentanarligt virki, er hugtakandi og rørandi.

Tí vil dómsnevndin heiðra hetta uppskotið, sum svarar eini rættiliga neyvari kappingarskrá við eini kveikjandi listaligari tilgongd og gevur sítt egna boð upp á fleiri av teimum spurningum, sum skráin setur. Útgreiningin í uppskotinum og tað góða skilið fyri náttúruni á staðnum er ein næstan sagnarkend søga, sum gerst grundarlagið fyri at fáa fram tað tilvitið, sum ógvuliga snøgt og í samsvari við byrjunarstøðið skapar bý.



Tó heldur nevndin, at uppskotið við sínum sveimandi og hugfarsliga lyndi ikki í nóg stóran mun er ført fyri at svara teimum meira ítøkiligum viðurskiftunum, ið kappingin er ætlað at lýsa.

Dómsnevndin metir, at uppskotið er ikki nóg miðvíst til at kunna gerast støði undir tí framhaldandi arbeiðinum hjá kommununi at skipa miðbýin í Klaksvík. Nevndin vil kortini vísa á hugsunarháttin, sum er í hesum uppskoti, og mæla kommununi til at halda fram við skipanararbeiðinum og hava líknandi arbeiðsgongdir í huga.

# Kappingarfakta

**Slag av kapping**
Opin hugskotskapping, og kappingartreytir eru sambært treytunum hjá Arkitektafelag Føroya.

**Fyriskipari**
Kappingin er útskrivað av Klaksvíkar kommuna.

**Tíðarskeið fyri kappingina**
20. januar - 27. apríl 2012.

**Móttikin uppskot**
154

**Dómsnevnd**
Uppskotini vórðu dømd av eini dómsnevnd við hesi samanseting:

- Gunvá við Keldu, borgarstjóri
- Auðunn Konráðsson, býráðslimur, sjómaður
- Óluvá Klettskarð, býráðslimur, cand.mag.
- Heri M. Hammer, býarverkfrøðingur
- Magnus Arge, form. Klaksvíkar Handilsfelag, handilsmaður
- Edward Fuglø, listamaður
- Vibeke Lydolph Lindblad, arkitekt MAA
- Mikael Viderø, arkitektur AF
- Gunnar Hoydal, arkitektur AF

Skrivari hjá dómsnevndini hava verið Robert Thomassen og Selmar Nielsen, arkitektar AF frá SNA.

**Kappingarsamskipan og -skrivari**
SP/F SNA samskipar kappingina. Tórálvur Weihe er kappingarskrivari fyri Arkitektafelag Føroyar(AF).

**Heiðurslønir**
Upphæddin til heiðurslønir og innkeyp var í minsta lagi 800.000,- DKK..

**Kappingargrundarlagið**
Kappingargrundarlagið var kappingarskráin og kort av Klaksvík í dwg formati. Annað tilfar var eisini tókt til kveiking. Uppskotini hava ikki verið bundin av verandi byggisamtykt fyri økið.

**Dømingarfortreytir**
Uppskotini eru dømd eftir góðskuni á heildarloysnunum fyri alt kappingarøkið, hetta í mun til loysnir innan býarplanlegging, arkitektur, landslagviðger og býarrúm og -design.
Harumframt er hugt positivt uppá uppskot, ið á kreativan hátt, vísa á møguleikar at sameina verandi bygging og umhvørvi á kappingarøkinum við nýggja miðbýin.

**Dømingartíðarskeið**
Dómsnevndin hevði fundir/gjøgnumgongdir dagarnar 8. – 9. og 10. mai 2012.

**Kappingarúrslit**
1. heiðursløn, DKK 400.000,- Uppskot 62/13542
2. heiðursløn, DKK 150.000,- Uppskot 99/29284
3. heiðursløn, DKK 75.000,- Uppskot 40/71421
Innkeyp, DKK 50.000,- Uppskot, 36/12557
Innkeyp, DKK 50.000,- Uppskot, 25/95522
Innkeyp, DKK 25.000,- Uppskot, 90/10707
Innkeyp, DKK 25.000,- Uppskot, 42/74327
Innkeyp, DKK 25.000,- Uppskot, 13/51230
Heiðursumtalu Uppskot, 44/62718

**Framsýning og almannakunngerð**
Almannakunngerð av niðurstøðu hjá dómsnevnd 01. juni2012.
Uppskotini verða sýnd fram í Klaksvík 01. juni – 04. juni 2012.

Klaksvík, tann 23. mai 2012

Dómsnevnd:

Gunvá við Keldu

Auðunn Konráðsson

Óluva Klettskarð

Heri M. Hammer

Magnus Arge

Edward Fuglø

Vibeke Lydolph Lindblad

Mikael Viderø

Gunnar Hoydal

Dómsnevndarálit
Ritstjórn: Sp/F SNA
Forsíðumynd: Finnur Justinussen, Fotostudio
Aðrar myndir: Upskotsstillarar
Uppseting: Sp/F SNA
Útgávudagur: 01. juni 2012
Útgávan er at finna hjá Føroya Arkitektafelag:
www.ark.fo